Kappingarárið 2021

28. apríl



Dagsins dystarbólt letur:

# Ingolf Sólheim Olsen

Leikskrá nr. 5

# LEIKARIN HESAFERÐ

**Stovnað:** 6. novembur 2007

**Heimavallir:**
Dungasandur í Sørvági
Valloyran í Sandavági

**Postadressa:**
Dungasandur 4, Sørvágur

**Telefon:** 590707

**Telefax:** 333550

**T-postur:**
07vestur@07vestur.fo

**Heimasíða:** www.07vestur.fo

**Formaður:**
Jón Nordendal

**Næstformaður**
Jens Kristian Haraldsen

**Skrivari:**
Finnbogi Niclasen

**Peningarøkil:**
Ingibjørn Johannesen

**Nevndarlimir:**
Egil Petersen
Eyðvør Petersen
Ove Heinesen
Rógvi Jacobsen

**Ábyrgd:**
Fróði Poulsen

**Blaðbólkur:**
Fróði Poulsen
Ingolf S. Olsen
Jóanis Albert Nielsen

**Uppseting:** Regin Davidsen

Navn: **Martin Petterson Heiberg**

Føddur: **29-09-1996**

Hædd: **174 cm**

Vekt: **71 kg**

Pláss á vøllinum: **Miðvøllur**

Besti matur: **Kvarpkjøtt**

Heimsins besti fótbóltspælari er: **Andrea Pirlo**

Onnur feløg tú hevur leikt við: **Vind, Raufoss**

Hvør er tann stuttligi á liðnum: **Asbjørn**

Hvør er pressarin á liðnum: **Martin Tausen**

Hvør á liðnum brúkar mest tíð frammanfyri speglinum: **Silas**

Hvør er besti teknikari á liðnum: **Eiler**

Besti tón-leikabólkur: **MJ**

Besti filmur/seria: **Wolf of Wallstreet**





# UPPTAKTIN

*V/ Jarnhold Nattestad*

Dystirnir koma tætt nú, og tað er soleiðis okkum fjepparum dámar tað. Sunnudagin móti Víkingi, og longu aftur móti EB/Streymi, okkara nærmasta kappingarneyta í landskappingini.

Úr 2-4 tapinum móti Víkingi kunnu vit avgjørt taka nógv við okkum, millum annað:

1. Vit kunnu ikki sóla okkum í success'ini, tá vit fáa mál. Vit skoraðu tíðliga til 1-0, men góvu gestunum 3 mál, áloypara teirra hattrick, uppá 15 minuttir. Tað ber ikki til.

2. Verjan má tettast. Við 4 málum ímóti í seinasta dysti, eru vit nú uppi á 20 málum ímóti, í 6 dystir. Tað er meira enn nakar annar í Betri Deildini - TB eru næstir við 19 og so B68 við 14. Og tað eru 5 fleiri enn í 2018

3. Triðja er positivt, at vit heilt víst hava mál í okkum, og, við 10 málum higartil, hava bert HB, KÍ og NSÍ skotið fleiri. Og vit hava skotið tvífalt so nógv sum seinast vit vóru í Betri Deildini. Tað var í 2018, og eftir 6 umfør høvdu vit bara 5 mál.

Gestirnir í 7. umfarið eru úr Sundalagnum. Áðrenn dystin liggja EB/Streymur eitt stig eftir okkum, við 5 stigum, og bert 5 málum og, men harafturímtói bara 11 ímóti. Teirra 5 stig eru komin við javnleikum móti ÍF og Víkingi, í tveimum teimum fyrstu dystunum, og so teprum 3-2 sigri á B68.

Sundalagsmenn hava eitt forholdsvís ungt lið, við dananum Ronni Møller-Iversen á odda. Danin kom úr Skála í vetur. Ronni hevur skotið 1 mál í ár, men annars er tað 20-ára gamli Símun Sólheim, sum hevur skotið 3 av teimum 5, teir hava fingið.

Hóast heldur tomu byrjanina, hava EB/Streymur annars ljóða til at hava høg mál í ár. Í miðlunum so seint sum mánadagin, vóru teir útróptir til at vera annar kandidaturin, saman við ÍF, til at kunna bróta inn í ovaru helvt av stigatalvuni. Tað kundi so ljóða sum um teri møguliga hava undirprestera higartil.

Hjá okkum er bert at taka tað góða við okkum frá undanfarnu dystunum, og so herja á. Tap móti Víkingi verður helst ikki definerandi fyri kappingarárið óansæð, men móti trilvandi sundalagsmonnum eru møguleikarnir heilt víst til staðar til at fáa nøkur stig á kontuna.

**Koyrið á 07 Vestur!**


VESTMEK
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA
Vestmek bjóðar góða góðsku
fyri góðan prís
VESTMEK
MASKINVERKSTAÐUR & SMIÐJA
Bryggjan 17 380 Sørvágur Faroe Isands www.vestmek.fo

Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

sendistovan

Sand- og skervsølan
í Sandavági

Alt innan:
- tilfar
- veitan
- levering

Finn meg á
facebook

Tlf: 213577

Lastvognskoyring v/ Erhard Dam

RISIN
BÓKHALDSVIRKI

TEL. 58 43 89

# Fótbóltur í Miðvági undir seinna heimsbardaga

Sambært Høgna Johansen í Miðvági vóru tað eingilskmenninir, ið lærdu miðvingar, at spæla fótbólt. ”Tað sum bleiv spælt fyri kríggið kann illa kallast fyri fótbóltur, tá bleiv tað bara langa til, og skumpa!” greiðir Høgni Johansen frá. Spælt var niðri á sandinum. Har lærdu teir miðvingar ymsan teknikk, millum annað at finta; eisini lærdu teir málmenninir upp.

”Vit spældu bæði ímóti teimum og við teimum”, greiður Høgni frá. Tað vóru fleiri av kompanínum, sum plagdu at spæla á sandinum. Hann minnist serliga væl, at teir servandu ”The Camironians” ofta spældu



fótbólt niðri á sandi. Hesir vóru skotar, ið høvdu verið í kríggi niðri á fastlandinum. Fleiri av teimum vóru løgnir og virkaðu traumatiseraðir.

Eingilskmenninir høvdu bæði bóltar og fótbóltskógvar við sær til Føroyar; og fleiri miðvingar fingu fótbóltsskógvar frá teimum. Eisini seldi handilin *Dalles* fótbóltsskógvar undir krígnum.

Tað vóru fleiri góðir fótbóltsspælarar í bygdini um hetta mundi, millum annað: Hans Jacop Hansen, Jóannes norði í Stovu, Jóhannus Joesen. Brøðrinir: Torstein og Laurentzius á Byrginum, vóru serstakliga góðir. Og ikki minst Svend á Vágalið - hann var tann besti á vøllinum.

Høgni Joensen heldur, at vágamenn mundu hava bestu fótbóltsspælarar í landinum undir krígnum.

### Luttók í rennikapping á Valloyruni í Sandavági

Høgni bleiv eisini úttikin til at luttaka í rennikapping á Valloyruni í Sandavági undir krígnum. Hann greiðir frá, at teir vóru fleiri sum runnu, og at hann eina ferð vann ein fínan pokal.

Høgni greiður víðari frá, at hann eina aðru ferðina kom til skaða, tá hann var til rennikapping á Valloyruni. Onkur hevði grivið eitt hol tætt við málið, og tá hann kom rennandi traðkaði hann í holið, datt og skurtlaði seg

illa í skøvningin. Tað ringasta var, at tað tók ilt fyri seg, og fekk hann tvær reyðar strípur upp eftir arminum og ein stóran knút undir armholina, so hetta var alvorligt. Man má minnast til, at penicillin ikki var kent um hetta mundi.

## Bleiv innlagdur á millitersjúkrahúsið í Sandavági

Hetta hevði við sær, at Høgni bleiv innlagdur á millitersjúkrahúsið, sum var í gomlu losju í Sandavági. ”So har lá eg á loftshæddini í fýra dagar og bleiv passaður av sjúkrapassarum'', greiður Høgni frá. Teir bundu fyrst um sárið, síðan koyrdu teir ”sunnilsápu” og sukur á, so bundu teir aftur um. Hetta trekti brunan úr sárinum. Høgni minnist, at tað bankaði øgiligt í arminum. Síðan bleiv hann vaskaður í glóðheitum vatni: ”Tað var so heitt at eg bæði rópti og sparkaði, og tveir sjúkrapassarar máttu halda mær” greiðir Høgni flennandi frá. ”Men líkamikið, allur brunin hvarv, so teir hava duga síni ting'', sigur Høgni Johansen. Hann minnist ikki um hann fekk nakað annað medisin, men hann var ógvuliga linur og svav nógv aftaná viðgerðina. Orsøkin til brunan vísti seg at vera eitt skitið glaspetti, sum hevði sett seg fast í sárið. Men pokalin hevur Høgni enn, sum eitt minni yvir hesa serligu tíð; og nú hevur hann avgjørt at lata hann til krígssavnið.



***Høgni Johansen við steypinum***




BANK**NORDIK**

**Heili 85% av føroyingum hava ikki nóg gott innlit í sína pensjón og sínar lívstryggingar. Ert tú ein av hesum?**

Kanna tína støðu á **banknordik.fo/pensjon**

*Ráðgeving, sum øll skilja*

EM Asfalt

Tel. 22 51 10 & 22 47 16

**jn**.fo

# VIÐLÌKAHALDSFRÌTT











## PLASTKLÆDNING OG BJÀLVING

Vit umboða dygdar húsaklæðningin úr plast.
Týski klæðningurin er sera væl egnaður til føroyska veðurlagið.

10 ymiskir litir eru at velja í,
og horn og listar fáast í somu litum.

Brettini eru heili 6 metur til longdar.

**SANDAVÁGS TIMBURHANDIL**

Hillingatangi - 360 Sandavágur - Tlf. 332700 - www.timbur.fo

# Bilasølan

STUÐLAR

07 VESTUR

ŠKODA



**Flott snið og týsk góðska, tá hon er allarbest.**


Sørvágs kommuna
stuðlar 07 Vestur
Varðagøta 8 • FO-380 Sørvágur • www.sorvag.fo


Vága kommuna
stuðlar 07 Vestur
www.vaga.fo
VÁGA KOMMUNA

| Nr. | Leikari | Aldur | Dystir | Mál | Minutir |
|---|---|---|---|---|---|
| 23. | Jóannis á Steig | 24 | 6 | 1 | 540 |
| 1. | Silas Eyðsteinsson | 23 | 6 | - | 540 |
| 8. | Martin Tausen (L) | 30 | 6 | - | 540 |
| 9. | Martin Heiberg | 24 | 6 | 1 | 534 |
| 10. | Erling F. Myklebust | 24 | 6 | | 495 |
| 22. | Predrag Jeremic | 33 | 6 | - | 429 |
| 14. | Ragnar Weihe | 19 | 6 | - | 325 |
| 21. | Teitur Olsen | 22 | 5 | - | 275 |
| 15. | Asbjørn Heðinsson | 20 | 5 | - | 450 |
| 2. | Eiler Fróðason | 17 | 4 | 2 | 360 |
| 4. | Dann Fróðason | 20 | 4 | - | 333 |
| 6. | Tór-Ingar Akselsen | 39 | 4 | 1 | 323 |
| 5. | Heine Mortensen | 30 | 4 | 1 | 298 |
| 11. | Zoran Vojovic | 35 | 3 | - | 167 |
| 3. | Dánjal Pauli Lervig | 29 | 3 | - | 158 |
| 24. | Sølvi Egilsson | 26 | 3 | - | 39 |
| 70. | Albert Theis Nielsen | 21 | 3 | - | 66 |
| 7. | Høgni E. Nielsen | 23 | 1 | - | 27 |
| 12. | Marjus E. Nielsen | 17 | 1 | - | 3 |
| 17. | Ingi Joensen | 18 | 1 | - | 2 |
| 16. | Ari í H. Petersen | 18 | - | - | 0 |
| 18. | Brandur Heinesen | 18 | - | - | 0 |
| | Venjari: Heðin Askham | | | | |

| Leikari |
|---|
| Ronni Møller-Iversen |
| Ári Arge |
| Hjalti Djurhuus |
| Símun Sólheim |
| Elias El Moustage |
| Rói Zachariasen |
| Árni Olsen |
| Mikkjal Hellisá |
| Niklas Kruse |
| Petur Zachariasen |
| Heðin Klakstein |
| Gutti Dahl-Olsen |
| Ragnar Danielsen |
| Andras Olsen |
| Magnus Jarnskor |
| Tóki Johannesen |
| Jóannes Davidsen |
| Arnbjørn Hansen |
| Rói Olsen |
| Jákup Hummeland |
| Fannhard Skoradal |
| Arnar Dam |
| Venjari: Jákup Martin Joensen |

unicar.fo

BILÚTLEIGAN, OG EISINI UMVÆLA VIT SKAÐAR,
LAKKERA OG SKIFTA RÚTAR + 298 544000

# STIGATALVAN

| # | Lið: | D | V | J | T | MF | MÍ | MM | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 6 | 6 | 0 | 0 | 20 | 2 | 18 | 18 |
| 2 | HB | 6 | 4 | 1 | 1 | 23 | 5 | 18 | 13 |
| 3 | NSÍ | 6 | 4 | 0 | 2 | 14 | 10 | 4 | 12 |
| 4 | Víkingur | 6 | 2 | 2 | 1 | 9 | 6 | 3 | 11 |
| 5 | B36 | 6 | 2 | 3 | 1 | 7 | 6 | 1 | 9 |
| 6 | ÍF | 6 | 2 | 1 | 3 | 9 | 16 | -7 | 7 |
| 7 | 07 Vestur | 6 | 2 | 0 | 4 | 10 | 20 | -10 | 6 |
| 8 | EB/Streymur | 6 | 1 | 2 | 3 | 5 | 11 | -6 | 5 |
| 9 | B68 | 6 | 0 | 2 | 4 | 7 | 14 | -7 | 2 |
| 10 | TB | 6 | 0 | 1 | 5 | 5 | 19 | -14 | 1 |



**Okkara málskjúttar: Eiler Fróðason 2, Erling Myklebust 1, Tór-Ingar Akselsen 1, Heine Mortensen 1, Martin Heiberg 1, Jóannis á Steig 1, Predrag Jeremic 1, Sjálvmál 2.**

CARRO
carro.fo - 21 25 51

FAE VÁGA FLOGHAVN

Giljanes bussar koyra um alt landið




Tel. 21 98 99 giljanes@giljanes.fo

VP.fo
Vágaportalurin

Vágafólk lesa Vágaportalin

VP.fo
Vágaportalurin







FOSSÁ

FROZEN FISH
LANDING

Hølcksmíð
v/Gerhard Hansen

Alt innan
timburarbeiði

Tlf. 282710



**Neinbjørn Nattestad**
Bilverkstaður
Tlf. 332727 | Fax. 333727

MÚRARIN

V/ Kell E. Jensen
Kálvalíðvegur 10
370 Miðvág
tlf. 332779 og 222101
t-post: murarin@olivant.fo


BETONG RUNT ALT LANDIÐ
58 50 25 ella 31 50 60
Vit veita eisini vegleiðing í sambandi við betongsløg og styrki
Blandistøðin er góðkend av Norska Kontrollrådet
J&K BETONG


Sp/f Mykines
Bryggjan 17
FO-380 Sørvágur
Tel. +298 21 08 70
www.mykines.fo
mykines.fo
must see from sea

# ÁBYRGDIN Á TÍNUM HERÐUM



***Eyðun Jakobsen***

Í løtuni fyrigongur tað mesta av spælinum uttanfyri vøllin. Áskoðararnir vita ikki hvønn veg teir skulu venda sær og um tað er Breddin sum hevur fótbóltsprátið.

Røðin av gølum hjá FIFA og UEFA er endaleys. Spælarnir í Europeiskum kappingum, sum vit vanliga samanbera okkum við, mótmæla skilið í Qatar og norski landsliðsvenjarin Ståle Solbakken trínur álvarssamur fram og hevur fremstafingur á lofti.

Tað var tí heilt margháttligt, tá forsetin fór at tosa um solidaritet. Tað verður kanska forsetin sum verður høvuðstalari komandi leygardag, tá Havnar Arbeiðarafelag bjóðar til 1. mei dagshald.

Føroyskur fótbóltur hevur ment seg øgiligt seinnu árini. Ferðin hevur verið høg, men eisini er tað spennandi. Í dag er føroyskur fótbóltur absolutt hæddarpunkt tá um føroyskan ítrótt ræður. Vit hava nakrar einarar, sum vit tó mugu hava størstu virðing fyri, t.d. miðvinginum Sverra.

Aftur til fótbóltin. Skipanarliga hava vit eitt topp professionelt samband, feløgini eru gott á veg og kagar tú í ætlaninar hjá sambandinum, so eru málini




komandi árini uppaftur størri. Pengarnir í føroyskum fótbólti eru ovurstórir, ja so nógvir, at leggur tú allan annan ítrótt saman, so megna tey ikki at yvirhála. Størst av øllum er fótbólturin.

At hava eina so ráðandi støðu, gevur fyrimunir. Í Amerika var Standard Oil og eigari tess Rockefeller í ráðandi støðu. Hetta hildu tey í Amerika verða í so vandamikið og gjørdu fyrstu lógirnar um anti-trust. At hava ráðandi støðu merkti, at man hevði vald at seta dagsskránna, vald at yvirtaka og at halda onnur niðri. Slík støða er júst tað føroyskur fótbóltur hevur í føroyskum ítrótti. Mangla nøkur lux á ovara vølli, verður uppstigað, eru plaststráini ov hál, verður rullað saman og sent avstað aftur í bingju. Um tey reisa endurgjald, tjaa, tað finna vit útav, týdningarmest er, at bólturin ferðast rætt.

Tíverri gerast vit øll fátækari av at nøkur hava ráðandi støðu, og tí er tað sera týdningarmikið at fótbólturin, 07 Vestur, ger sær greitt hvønn leiklut man ynskir at hava í nærsamfelagnum. Ikki minni stóran týdning hevur tað, at kommunurnar eru greiðar yvir sín leiklut og arbeiða fyri fjølbroytni og at hjúkla um tey smærru.

Eitt breitt felagslív er grundarlag undir øllum felagslívinum, og eisini 07 Vestur hevur gagn av tí. Tak t.d. flogbóltin her vesturi. Tvey FM komu til høldar í ár, men samstundis fekk 07 Vestur eitt kvinnulið, fer tað at ganga útyvir flogbóltin?. Vit hava sæð á mannfólkasíðuni, at nú dragnar í FM heitum í Vágum. Tað stóra hálið sum Sandavágs talvfelag gjørdi, var tí tað bar til hjá einum sum dugdi mannagongdirnar, bæði á puntuta brettinum og grøna plastvøllinum. Tað er onki at ivast í, er man størstur, hevur man størstu ábyrgd. Saman at standa, ella sum forsetins sigur “solidarisk mugu vit verða”.

***Góðan dyst***


BÓNUS
STUÐLAR ÍTRÓTTINUM Í NÆRUMHVØRVINUM
mánadag til leygardag | 9-22







VESTPACK

VESTPACK

VESTPACK

# Handilsvirkið Niclasen

Timburhandil og byggibúð



Handilsvirkið Niclasen - Bakkavegur 26
Teldupostur: niclasen@niclasen.fo
TLF: 33 20 01 - FAX: 33 20 50

SMIÐJAN
TEL. 30 88 88

Klima

MTHøjgaard

KIA

Movement that inspires

# Bílegg títt kort her

betri.fo/fjepparakort



# DYSTARSKRÁ 2021 BETRIDEILDIN

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1. | 07-03-2021 | 07 Vestur - B36 | 0-2 |
| 2. | 13-03-2021 | 07 Vestur - B68 | 3-2 |
| 3. | 20-03-2021 | ÍF - 07 Vestur | 3-1 |
| 4 | *28-04-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | (útsettur) |
| 5. | 11-04-2021 | HB - 07 Vestur | 7-0 |
| 6. | 14-04-2021 | TB - 07 Vestur | 2-4 |
| 7. | 25-04-2021 | 07 Vestur - Víkingur | 2-4 |
| 8. | 02-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | |
| 9 | 08-05-2021 | NSÍ - 07 Vestur | |
| 10. | 13-05-2021 | 07 Vestur - KÍ | |
| 11. | 16-05-2021 | B36 - 07 Vestur | |
| 12. | 24-05-2021 | B68 - 07 Vestur | |
| 13. | 12-06-2021 | 07 Vestur - ÍF | |
| 14. | 20-06-2021 | Víkingur - 07 Vestur | |
| 15. | 26-06-2021 | 07 Vestur - NSÍ | |
| 16. | 27-07-2021 | 07 Vestur - EB/Streymur | |
| 17. | 02-08-2021 | HB - 07 Vestur | |
| 18. | 08-08-2021 | 07 Vestur - TB | |
| 19. | 15-08-2021 | EB/Streymur - 07 Vestur | |
| 20. | 22-08-2021 | ÍF - 07 Vestur | |
| 21. | 28-08-2021 | 07 Vestur - B68 | |
| 22. | 12-09-2021 | 07 Vestur - B36 | |
| 23. | 19-09-2021 | KÍ - 07 Vestur | |
| 24. | 26-09-2021 | 07 Vestur - Víkingur | |
| 25. | 17-10-2021 | NSÍ - 07 Vestur | |
| 26. | 24-10-2021 | 07 Vestur - HB | |
| 27. | 30-10-2021 | TB - 07 Vestur | |

# Familjubuffét

**Mán-Hós: Kl. 16.30 – 20.00**
**Fríggjadag: Kl. 16.30 – 21.00**
**Leygardag og Sunnudag: Kl. 13.00 – 21.00**



## Et, alt tú orkar, fyri 139,-

**(12 ár og eldri | Íroknað ísbuffét, sodavatn og kaffi/te)**

## Og títt barn etur fyri einans 70,-

**(11 ár og yngri, saman við foreldrum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

## Bólkar (min. 10 fólk) 100,-

**(11 ár og yngri, saman við minst einum gjaldandi vaksnum. Íroknað ísbuffét og sodavatn)**

**Lat okkum ordna innkeypið og uppvaskið**

PIZZA 67

**www.pizza67.fo – Tel 356767**

Vit hava 3 sløg av pizza, salat, 4 sløg av dressingi, nachos, nýbakað hvítleyks-breyð, høsnagrýtu, nuggets, buffalo høsnaveingir, várrullur, chips, rís og 5 sløg av sodavatni, og omaná fáa tit 7 sløg av ísi og kaffi.


Heildar-
loysnir
frá
ArtiCon
SANSIR
HOTEL BRANDAN
ARTICON
Articon P/f · á Hjalla 20 · 188 Hoyvík · Tel. 350 700 · www.articon.fo


Betong og timburarbeiði
Jóni Durhuus, byggimeistari • FO-350 Vestmanna • Tlf. 424473 - 223124

SPORT 24

KEYP EISINI OKKARA VØRUR
Á FØROYA FEITASTA NETHANDLI

**WWW.SKALKUR.FO**

ÓKEYPIS TIL DYRNAR
Í ØLLUM FØROYUM.

| SMS 31 95 12 | SALTANGARÁ 45 95 12 |


SPEKT
løggildir
grannskoðarar
Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn
Telefon 34 34 34
spekt@spekt.fo
www.spekt.fo
Heildarloysn til kappingarføran prís
lætt og ómakaleyst
XBRL, skatt, bókhald, MVG, roknskap og annað
Ring ella les meira um okkara heildarloysnir á www.spekt.fo


Frá stórum til smærri
MASKINGREVSTUR
- PLANERING
- ÚTGREVSTUR
- BREKKING
Tilboð verða latin
Vit hava maskinur til hvørja einstøku uppgávu
Maskingrevstur v/Allan H. Hansen · 370 Miðvágur · tel 22 22 41


Øll hava rætt til góð
BARNAÁR
Drekka foreldur tíni ov illa?
Les meira á barnaár.fo
Modelmynd


Föroya Bjór
NÚ
Í DÓS
Jolly
ORANGE
Jolly
ORANGE
FÆST KRING
LANDIÐ

HIDDEN**FJORD**

RAISED IN THE WILD

# Fyrsti alari í heiminum at gevast við flogflutningi

At flúgva vøru elvir til óneyðugt $CO_2$-útlát.
Ov nógv $CO_2$-útlát elvir til veðurlagsbroytingar.



Við at skifta til sjóflutning er $CO_2$-útlátið fyri flutning til USA minkað við heili **94%**